FØÐINGAR

17. januar fingu Frida Samuelsen og Helgi Guttesen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3925 gr.

17. januar fingu Marjun Poulsen og Aksel Haraldsen, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4240 gr.

17. januar fingu Linda og Frimodt Rasmussen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4000 gr.

18. januar fingu Jakoba Bech, Porkeri og Jaspur Bjartalíð, Svínoy, eina dóttur. Hon var 47 cm. long og vigaði 2050 gr.

19. januar fingu Linda Hansen og Jóhan Birgir Dahl-Olsen, Hardórsvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3900 gr.

20. januar fingu Fríðunn E. og Peter Hentze, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4610 gr.

20. januar fingu Naina Ennigarð og Jens Andrias Dam, Kollafjørður, eina dóttur. Hon var 48 cm. long og vigaði 2525 gr.

20. januar fingu Sóleyg og Magnus Tausen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3675 gr.

21. januar fingu Oddbjørg Johansen og Johnhard Klettheyggj, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4300 gr.

22. januar fingu Sólrun Joensen og Martin Dam, Keypmannahavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4062 gr.

24. januar fingu Esther Dahl og Kristvin B. Jacobsen, Argir, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 2850 gr.

ANDLÁT

17. januar
Ester Støylen Isaksen, Klaksvík, 81 ár.
Sigurd Petersen, fyrrverandi lærari, Fuglafjørður, 93 ár.

18. januar
Janus Jensen úti í Stovu, Skúgvi, 85 ár.

19. januar
Brynhild Larsen, Tórshavn, ættað úr Sørvági, 71 ár.

20. januar
Sofus Gottfred, Porkeri, 82 ár.

21. januar
Albert Michaelsen, Klaksvík, vanliga nevndur Albert í Kunoy, 85 ár.

22. januar
Olivia Poulsen, fødd Nielsen, Lopra, 64 ár.

23. januar
Johanna Michalina Poulsen, fødd Aaergaard á Sandi, 102 ár.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 26. jan.: Andreas Petersen, tlf. 441086
Sunnudagin 27. jan.: Hálvdan Simonsen, tlf. 441490

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

TILTØK

Gudstænastur Septuagesima
Vesturkirkjan: kl. 11, Erland Beder
Argja kirkja: kl. 11, Bergur D. Joensen, altarg. Talvan gongur fyri Heimamissiónina
Havnar kirkja: kl. 11, Sonja Klein
Vestmanna: kl. 12, M. Bæk Saksun: kl. 11
Hvalvík: kl. 12, altarg., I. P. Dam
Kaldbak: kl. 12, Sverri Steinhólm
Sandavágur: kl. 12, altarg., David Johannesen
Fríðrikskirkjan: kl. 11, Martin R. Jacobsen
Skála: kl. 11, altarg., Jógvan Fríðriksson
Leirvík: kl. 12, altarg. Uni Næs
Glyvrar: kl. 11, talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuni, Meinhard Bjartalíð
Christianskirkjan: kl. 11, altarg., Hans Eiler Hammer
Klaksvíkar sjúkrahús: kl. 10
Norðoya røktarheim: kl. 14.30, Elsa Funding
Húsavík: kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen
Hvalba: kl. 12, Ólavur Rasmussen
Vágur: kl. 11,
Sumba: kl. 18, altarg. Marianne Telling

Rhema á Hálsi
Sunnudagin kl. 17 Møti og Sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Jørundur Hansen talar og greiðir frá trúboðaravirki í Suður Grønlandi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11 Møti v/ Niels Edvard Olsen. Eingin sunnudagsskúli. Kl. 17 Møti fyri alla familjuna, drekkamuður.
Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøti.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við Kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Kvøldmøti (sjónvarpsupptøka).
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangeliskt møti, kl. 21 Útimøti.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti. Heimasíðan: www.ebenezer.fo

»Tíð til Gud«
verður úti í Pálsstovu sunnukvøldið kl. 21. Ungdómur luttekur við boskapi og vitnisburði, Dánjal og Jógvan framføra drama. Drekkamður aftaná. Verið hjartaliga vælkomin.

Meinigheitshúsið
Missiónsvikan verður í døgunum 27. jan. til 3. feb., og barnaansing verður øll kvøldini.
Sunnudagin kl. 14 Familjumøti/sunnudagsskúli, Gentukórið, Manskórið og Meinigheitskórið syngja. Kl. 18 Møti v/ Alfred Petersen, Rituvíkskórið syngur.
Mánakvøldið kl. 20 Møti v/ Sørin Steinhólm, Kristiliga sangkórið syngur.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18 Møti har sangbólkur úr Hoyvík luttekur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Miu Hansen.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Ten-sing kórið venur, ung frá 13 ár og uppeftir eru vælkomin við.

Hvítusunnusamkoman
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

Konfirmatión í Havnar kirkju
Várkonfirmatiónirnar 2002 verða 24. mars og 7. apríl. Konfirmantarnir skulu møta í Havnar kirkju týsdagin 29. januar kl.15. Markið millum Suðurstreymoyar eystara og vestara prestagjald er Tróndargøta, Varðagøta og Villingardalsvegur.

Saron, Vestmanna
Leygardagin kl. 15-17 Bíbilseminar við Sam Jacobsen, evni: Efesusbrævið.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ breyðbróting, Eiler Johannesen talar. Kl. 13 Familjudoguði, tilmelding seinast fríggjadagin á tlf. 424239 ella 424238.
Mánadagin húsmøti hjá Jón og Binu.
Tlf. andaktin 424741.

Missiónshúsið í Hvalvík
Missónsvika er í Hvalvík 23. til 27. januar.
Leygardagin kl. 20 talar Mourits Mouritsen, Meinigheitskórið syngur. Innsavnan til húsið.
Sunnudagin kl. 12 Gudstænasta v/ altargongd Inga P. Dam. Kl. 15 Familjumøti við Mary Ann Poulsen. Kl. 18 Thomas Dam og Petur Hans Hansen tala og syngja.
Innsavnan til H. M. Hvørt kvøld verður drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Húsakórið venur kl. 16.30. Kl. 18 Møti við Malmberg Olsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Meinigheitshúsið á Skála
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti við heimligum kreftum.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 19 Møti.

Keldan, Skálafirði
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Vón fyri Framman, við hugna, vitnisburði og sangi, ymisk luttaka.
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17 Møti v/ Helga Abrahamsen, Barnamøti kl. 17.
Alpha- og Beta-skeið fyri vaksin (15 ár og upp) í Kelduni í Skálafirði byrjar 14. februar. Møguleiki er at tekna seg við at ringja á 449962 ella 449222.

Elim, Søldarfjørður
Sunnudagin kl. 12 Breyðbróting og sunnudagsskúli.
Kl. 18 Evangel. møti v/ Birgir Poulsen, Lis luttekur við sangi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Losjan í Gøtu
Hjartaliga vælkomin til ein tíma við Bíbliuni í Losjuni í Gøtu sunnudagin 27. jan. kl. 19.30 v/ Karen J. Lund og Ingerd Hildershavn.

Gøta
Ungdómsmøti í Kirkjukjallaranum í kvøld er avlýst, ístaðin fara vit til Leirvíkar á ungdómsmøti. Bilar koyra frá Missiónshúsinum kl. 19.45.

Thabor, Fuglafjørður
Einki ungdómsmøti í Thabor. Farið verður ístaðin á missiónsviku í Leirvík. Koyrt verður frá Thabor kl. 19.40.
Sunnudagin er felags sunnudagsskúli í Thabor kl. 14.30.
Einki møti sunnukvøldið, men farið verður til Leirvíkar á missiónsviku. Koyrt verður frá Thabor kl. 18.40.

Missiónshúsið, Leirvík
Missiónsvikan heldur fram við møti í kvøld kl. 20. Sverri Kass talar og Effata syngur.
Sunnudagin verður familjumøti kl. 15 og møti kl. 19, har Hanus Lassen talar og Thaborkórið úr Fuglafirði syngur. Barnaansing er undir møtunum.

Hebron, Leirvík
Møtirøð verður í Hebron í vikuskiftinum.
Leygarkvøldið kl. 20 og Sunnukvøldið kl. 18. Talarar Høgni Johannesen og Janus Gunnarsson. Eisini verður sangluttøka við ungum úr Havn, Leilu av Reyni, Allan og Bárður. Øll eru vælkomin.

Lívsins Orð
Sunnudagin kl. 10.30 verður møti við breyðbróting. Kl. 17 verður Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

Soli Deo Gloria
Mikukvøldið kl. 20 Fyrilestur fyri pør.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 20 Alphaskeið.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

Aglow, Klaksvík
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið 26. januar kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl 17.30 Lovsangs- og bønarmøti og kl. 18 Møti.

Sion, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

»Orðið er tær nær!«
Róm. 10,8

Talan er her um Jesu orð. Vit møta orði hansara í hinum kristna samfelagnum, í kirkjuni.

Ja, Jesus er sjálvur hetta orð.Og hann er komin inn í hjarta okkara. Tí er hann ikki langt burtur frá nøkrum av okkum.

Menniskju leita ymsastaðni eftir Gudi. Tey halda, at hann er langt burtur. Tey leita í ymsum átrúnaðum. Og tað eru nokk av tilboðum í so máta. Tann Gud, vit trúgva á, er ikki langt burtur. Hann er at finna í hinum kristna kirkjuliðnum. Hann kemur til okkara við dóp og altarbørð. Hann kemur í orðinum. Jesus er sjálvur hetta orð.

Hví so fara aðrastaðni at leita eftir honum. Vit kunnu eisini biðja til hansara. Hann heldur í hond okkara og hann leiðir okkum frameftir móti tí æviga. Minst til, at aðrenn tú fanst Gud, fann Gud teg. Hann fann teg, meðan tú vart langt burtur. Vit fóru øll av leið og viltust sum seyðir. Men Jesus fann okkum og hann leitaði okkum upp.

Tað er gleðiboðskapurin til okkara. Nú noðyist eingin menniskja at liva uttan Gud. Men vraka vit hann, eiga vit onga framtíð. Vit eru sum kristin eyðmerkt at hoyra honum til. Hetta hendi í dópinum. Trúgvin ber okkum boð um hetta. Hví so leita eftir Gudi alla aðrastaðni enn hann er at finna? Gakk kirkjugøtuna. Kenn títt pláss inni undir orðinum. Bið til hansara. Lat orðið svara aftur í hjarta tínum í trúgv og kærleika. Lat alt liv títt verða eina játtan og ein vitnisburð. Gev Jesusi pláss í lívi tínum. Og lat liv títt verða merkt av trúgv og kærleika!

Amen.

David Johannesen

TILTØK

Café One Way, Tvøroyri
Leygarkvøldið letur caféin upp kl. 22.
Týsdagin kl. 15.30 Barnahugni.
Onsdagin verður bønarmøti fyri kvinnur kl. 21.
Tórsdagin venur dansibólkurin kl. 19.15. Hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangeliskur fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti í Fjallbrúður, Sámal Jákup Joensen talar.
Mánadagin kl. 20 Heimaforbundið – møti fyri allar kvinnur.

Vitnið í Hvalba
Fundir við Poul Færø og John í Skemmuni verða í kvøld kl. 20 og sunnudagin kl. 18.

Føroysk møti í Esbjerg
Leygarkvøldið 26.1. kl. 19.30 verður møti í Zionskirkens sognhus, Nygårdsvej 10, Andreas Hansen talar og Elsa Mikkelsen syngur.
Bønarmøti byrjar kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Dagtilhaldið Fløvin
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

Dagtilhaldið í Vági
Dagtilhaldið er opið týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00. Øll eru vælkomin.

Pensionistafelagið í Tórshavn
hevur aktión í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøldið 30. jan. kl. 19. Havið pakka við.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn,ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við *Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 311391/261516.*

Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184.

Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við aftervinging.
Sendi okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, Vingetoften 18, DK 2730 Herlev
Tú kanst eisini ringja til: tlf. 4484 2665 (Jón) mobil: 2443 0903 (Jón)
www.neozone.dk

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag kl. 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 28. januar
kl. 9.45-10.15 Fimleikur Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Seyma fýrkantar saman til móður Theresufelagsskapin
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491
Týsdagin 29. januar
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur. Óli Vang. **Øll eru hjartaliga vælkomin**
kl. 15 Arbeiðið á misjónsmarkini, Elsa Jacobsen
Mikudagin 30. januar
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15 Túrur
Hósdagin 31. januar
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Teldupræt, Brandur Petersen
Fríggjadagin 1. februar
kl. 10-13 Matgerð Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tin stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

AA-fundir í Havn
Reinsarív, Tórsgøta 5:
Royktfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Týskvøld: Er bara fundur ólíka viku nr.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

VBA (Vaksin børn til alkoholikara) ella ørkymlandi familjuumstøður. **Opin** fundur sunnudagin kl. 17.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla lærararíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Blára Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

MÁF
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924, e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy.
Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

MBF
Íslandsvegur 10C
100 Tórshavn
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 · Fax 310813
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Sinnisbati
Íslandsvegur 10 C,
100 Tórshavn
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

Javni
Hoydalsvegur 40
3. hædd (ovast).
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 9-12.
Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo heimasíðan: www.deaf.fo

Køliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664 Beinta tlf. 310574 Henning tlf. 314783.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

Heilafelagið, MBF-húsið
Íslandsvegur 10
tlf./fax 321520
Føst telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.

BRÚDLEYP

Leygardagin 2. februar kl. 16 giftast í Vesturkirkjuni Karin Vatnsdal, Skopun og Benny Forná, Tórshavn. Vælkomst verður í Flatnagerði 10b aftaná kl. 21.00.

Leygardagin 16. februar kl. 14 giftast í Rituvíkar kirkju Ulla Hüche Nielsen, Vejle og Ian Højgaard, Rituvík. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp verða biðin um at siga frá áðrenn 2. februar á tlf. 447634 ella 448056.

SILVURBRÚDLEYP

Leygardagin 2. februar kunnu hjúnini Dagny og Gerhard Tróndheim, Klaksvík halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Betesda kl. 19.

PRÓGV

Ingi Hansen, Haldarsvík, hevur á Esbjerg Seminarium lokið prógv sum pedagog, við ítrótti sum sergrein.

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Føroyingar í Noregi
E-mail:foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

Føroyingafelagið í Århus
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Teldupostur:
aaarstova@hotmail.com
Café'in er opin mánadag til hósdag kl. 16-18 og leygarkvøldscafé kl. 22-03.
Reglulig tiltøk: Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30.
Bókasavn: Føroyskar bøkur kunnu lánast í Åarstovu mánadag-hósdag kl. 16.00-18.00.
MFS-stovan hevur opið hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Kassameistari er at hitta hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Flogbóltur er í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16.00-18.00. Badminton í Frydenlundskúlanum sunnudag kl. 16.00-18.00. Innandura fótbóltur í Hasselagerhøllini fríggjadag kl. 21.00-23.00.

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum. Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt.

Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

Føroyahúsið í Keypmannahavn
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail addressa:
postur@faroehouse.dk
Heimasíðan:
www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð. Føroyskur døverfamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

Føroyingafelagið í Aalborg
Lille kongens gade 10B,
tlf. 98 13 63 30
email: alaborg@alaborg.dk
Álaborg er opið soleiðis:
Fríggjadag 17.00-19.00 og Leygarkvøld 23.00-03.00.
Álakórið venur mikukvøld kl. 19.30
Annars verða tiltøk hjá felagnum lýst í Túnatos og á heimasíðuni www.alaborg.dk

Føroyingafelagið við fjørðin
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438 Gudni tlf. 47387748.

Føroyingafelagið í Reykjavík
Elin S. Wang,
Melabraut 8,
170 Seltjarnarnes, Ísland
Tlf. +354 5522368
E-mail: forrek@visir.is